# Spælibólkar hjá 3. flokki - vár/summar 2024 Skúlin við Løgmannabreyt

So eru nýggir spælibólkar gjørdir fyri várið/summarið 2024. Av tí at tey hava havt fleiri spælibólkar, er eitt sindur ringt at fáa tað til at passa, at tey ikki hava verið sama áður. Hesa ferð hava vit gjørt tað, sum eitt ”lutakast”. Næmingarnir hava tikið eitt nummar, og tað er tann bólkurin, tey er komin í.

Vit vóna, at allir bólkar fara at møtast, tí hetta eru síðsti bólkurin í innskúlingini.

Endamálið við at hava spælibólkar er at styrkja um felagskapin í flokkinum. Tað er somuleiðis fyribyrgjandi ímóti happing, at børn vitja heimið og møta foreldrunum hjá hvør øðrum.

Ætlanin er IKKI, at spælibólkurin skal vera eitt stórt tiltak, har skipað verður fyri bowling, bio, hestaríðing o.ø. - Heldur er ætlanin at uppliva ein vanligan dag heima hjá næminginum, har næmingarnir hugna sær saman við spæli og fáa kanska okkurt at eta og drekka. Ynskiligt er, at børnini eru saman uttan skerm.

Tað er gott, um foreldrini kunnu práta við barn sítt, áðrenn spælibólkin, um hvat tey kundu farið at gjørt saman. Tá ið spælibólkurin er, er somuleiðis umráðandi, at foreldrini eru við at tryggja, at børnini hugna sær, og at øll eru við.

Ynskiligt er, at foreldrini koma inn til ein kaffimunn, tá børnini verða heintað. Talan er her bert um at fáa heilsa uppá hvør annan aftur við einum kaffi-/temunni og møguliga eini (keyptari) smákøku afturvið.

Um ikki liggur fyri hjá einari familju at hava bólkin, mugu hesi geva boðini víðari til tann næsta í røðini, so bólkurin ikki steðgar upp. Ella tann næsti í røðini, hevur bólkin, tá tey standa til at hava. GG! vikunummar er bara vegleiðandi.

Í Skúlanum við Løgmannabreyt leggja vit stóran dent á, at næmingarnir skulu trívast í skúlanum, vitandi, at hetta er ein fyritreyt fyri, at næmingarnir læra. Sum liður í at skapa trivnað og samstundis at fyribyrgja happing, hevur skúlin valt at skipa fyri spælibólkum.

Nýggju bólkarnir eru fylgjandi:

| Vikur | Bólkur 1 | Bólkur 2 | Bólkur 3 | Bólkur 4 | Bólkur 5 | Bólkur 6 |
|---|---|---|---|---|---|---|
| ´5-7 | Flykra | Rói | Jóhan | Nóam | Elias | Rókur |
| ´8-10 | Jógvan | Lea | Bjørt | Ró | Rebekka | Emma |
| ´11-14 | Fasai | Símun | Pætur | Tróndur | Sverri | Noam |
| ´15-17 | Brandur | Malena | Lilja | Sara | Viktoria | Eva |
| ´18-20 | Bjørg | Helgi | Ravnur | Villiam | Dánial | Jósef |
| ´21-22 | Benjamin | Naomi | Marita | Halla | Guðrun | Lissi |
| ´23-25 | Sanna | | Hugin | Bartal | Martin | Bragi |